LM-047/2023

Fylgiskjal 3

FØROYA REIÐARAFELAG

Tórshavn, 15. juni 2023

**Hoyringsskriv til lógaruppskot um broytingar í brúksskyldu**

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hevur sent lógaruppskot um broytingar í sjófeingislógini viðvíkjandi brúksskyldu og treytum fyri avhending av rættindum til hoyringar. Føroyar Reiðarafelag hevur viðgjørt uppskotið, ið kann hava stórar avleiðingar fyri limir felagins, og hevur hesar viðmerkingar.

Reiðarafelagið hevur áður mælt frá at hava ov strangar reglur viðvíkjandi brúksskyldu, av tí at trupulleikin við óbrúktum fiskirættindum hevur verið lítil. Orsøkin til óbrúkt fiskirættindi er sum oftast, at tað ikki loysir seg at fiska av hesum rættindum. Hesa sannroynd broyta reglur um brúksskyldu og avhending ikki. Tískil eiga slíkar reglur ikki at vera ov strangar, og tær eiga at leggja upp fyri ótilætlaðum avleiðingum við neyðugum undantøkum. Hetta er tíverri ikki gjørt, tá ið reglur um brúksskyldu hava verið settar í verk seinastu árini. Um ein greiður trupulleiki verður orðaður, ber til at sniðgeva loysnir til henda trupulleika. Ístaðin eru bert yvirskipaðar endamálsorðingar gjørdar, og loysnirnar hava síðani havt eina røð av ótilætlaðum avleiðingum.

Síðan sjófeingislógin varð samtykt í 2019 hevur verið greitt, at tørvur hevur verið á broytingum í reglunum um brúksskyldu. Orsøkin er, at hesar reglur kunnu hava sera óhepnar og ótilætlaðar avleiðingar fyri fleiri reiðarí. Tvey uppskot vórðu løgd fram í undanfarna valskeiði viðvíkjandi broytingum í brúksskyldu, men hvørki varð samtykt av ymsum orsøkum.

Hetta uppskotið er sostatt tað triðja, sum hevur til endamáls at broyta verandi reglur um brúksskyldu. Hetta er ein keðilig støða, tí at hon skapar óvissu hjá reiðaríunum um tey rætttindi, ið eru grundarlagið undir teirra virksemi. Harumframt skapar hetta óvissu um, hvørjar avgerðir reiðaríini skulu taka fyri at tryggja síni rættindi.

Fyrsta broytingin er, at 60% treytin fyri at avhenda rættindi verður galdandi fyri allan fiskiskap. Hetta verður galdandi frá 1. januar 2025, og tað fyrsta uppgerðartíðarskeiðið er árið 2024. Undantakið er tó, at hendan reglan verður galdandi fyri norðhavssild, makrel og svartkjaft frá 1. januar 2026, soleiðis at fyrsta uppgerðartíðarskeiðið er árið 2025.

60%-reglan hevur áður verið galdandi fyri fiskidagar undir Føroyum umframt botnfisk undir Íslandi. Tó var 60%-reglan bert galdandi fyri fyribils avhendingar fyri eitt ár fyri botnfisk undir Íslandi. Tvs. at endalig avhending av botnfiskakvotu undir Íslandi var ikki avmarkað av 60%-regluni í tí lógini.

Nú verður hendan reglan galdandi fyri øll fiskirættindi. Talan er tí um eina týðandi herðing av hesum reglum. Mett verður, at hetta fer at hava við sær, at tey skip, sum ikki veiða makrel sjálv, verða noydd at avhenda sínar makrelkvotur, áðrenn reglan fær gildi. Annars fara kvoturnar at gerast óatkomiligar hjá rættindahavarum, sum verða noyddir at sleppa sær av við tær. Hetta verður ein dyggur smeitur fyri hesi skip,

Boks 361 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 73 99 12 • Teldupostur: stefan@industry.fo

sum ikki hava møguleika at veiða makrel við egnum skipi. Sum skilst er hetta eisini ein tilvitað ætlan við uppskotinum.

Greitt er, at broytingarnar í 60%-regluni hava við sær, at fleiri skip skulu avhenda sínar makrelkvotur. Landsstýrið átti tí at broytt ella avtikið lóg um skatting av vinningi frá sølu av veiðirættindum, soleiðis at tað gerst lættari at avhenda hesar kvotur. Hetta hevði givið reiðaríunum ein høgligan hátt at sleppa av við kvoturnar og hevði bøtt nakað um avleiðingarnar tey skip, sum ikki veiða makrelin sjálv. Um ætlanin er, at skip skulu avhenda síni rættindi, átti landið samstundis eisini at skapt betri karmar um avhending. Tað hevði verið ein bati fyri tey skip, sum frammanundan hava tungan rakstur, um tey t.d. kundu avhenda síni rættindi uttan eykaskatt. Havast skal í huga, at veiðigjald er nú lagt á allar makrelkvotur, samstundis sum gjaldið verður hækkað í tveimum umførum komandi árini. Um regluverkið kring avhending gerst ov stirvið, er vandi fyri, at tillagingin í vinnuni steðgar.

Síðani er skotið upp at gera eina nýggja undantaksreglu til 60%-regluna. Hetta er ein bati í mun til verandi ásetingar, har eingin undantaksregla er. Týdningarmikið er tó, at hendan undantaksregla í veruleikanum fer at fevna um allan tann fiskiskap, ið hevur tørv á undantaki. Talan verður um eina meting, sum Fiskimálaráðið skal gera í hvørjum einstøkum føri, og tá er týdningarmikið, at undantaksreglan er greið, og at hon verður umsitin sambært upprunaligu ætlanini í viðmerkingunum.

Viðmerkingarnar gera ikki greitt, nær ein kvota er ov lítil, og tískil verður fevnd av undantakinum í §31, stk. 3. Viðmerkingarnar siga, at undantakið ikki er ætlað til støðu, har heildarkvotan ikki kann sigast at vera óvanliga lítil, men har einstøk fiskifør hava sera lítla kvotu í júst hesum fiskiskapi. Spurningurin er t.d., um toskafiskiskapurin á Flemish Cap, har føroyska heildarkvotan í ár er 1.647 tons (íroknað kvotuna frá Bretlandi), hevði fingið undantak frá 60%-regluni í 2023. Hetta er ikki greitt í viðmerkingunum, men ein tulking hjá umsitingini verður síðani avgerandi, um eitt undantak er møguligt.

Ein annar spurningur viðvíkjandi undantakinum frá 60%-regluni er, tá ið fiskiskapurin ikki er nóg góður til at fáa lønandi rakstur, hóast kvotan er nóg stór. Eitt dømi um hetta var føroyska rækjukvotan við Eysturgrønland, har eingin fiskiskapur var í mong ár, hóast Føroyar høvdu eina kvotu uppá meira enn 1.000 tons í avtaluni við ES. Hetta hevur eisini gjørt seg galdandi í rækjufiskiskapi við Svalbard, har vantandi lønsemi í fiskiskapinum hevur gjørt, at skipini ikki hava gagnnýtt fiskidagarnar til fulnar.

Í slíkum føri átti eisini at verið givið undantak frá 60%-regluni, men tað er ikki greitt í serligu viðmerkingunum til hesa áseting. Tí eiga viðmerkingarnar til undantaksregluna at gera greitt, at undantak eisini skal latast, tá ið fiskiskapurin er vánaligur ella ikki lønar seg, og at skipini av hesi orsøk ikki gagnnýta 60% av sínum rættindum, hóast kvota ella rættindi eru tøk.

Í viðmerkingunum til §36, stk. 3 har undantakið til yvirskipaðu brúksskylduna verður allýst, er undantakið til 60%-regluna beinleiðis nevnt sum ein orsøk til at lata undantak frá 2-ára brúksskylduni. Viðmerkingarnar til hesa reglu siga, at undantak kann veitast, tá ið veiðibann er lýst ella tá ið stovnurin er illa fyri, og staðfest er, at lítið og einki er at fáa. Hesar undantaksreglur áttu eisini at verið galdandi fyri 60%-regluna í §30 og §31.

Eitt dømi um ógreiðar orðingar viðvíkjandi undantøkum eru reglurnar viðvíkjandi landing uttanlands. Har eru viðmerkingar um, at fjarstøða frá fiskileið kann geva Fiskimálaráðnum heimild at veita skipum undantak frá kravinum landing í Føroyum. Tó er ógreitt, hvat hugtakið *fjarstøða* merkir. Hetta skapar eina ógreiða støðu hjá fiskiskipum, tá søkt verður um undantak, og nær tað kann latast.

LM-047/2023

Samanumtikið er týdningarmikið, at undataksreglur eru orðaðar breitt og á slíkan hátt, at tær fevna um allar óhepnar og ótilætlaðar avleiðingar, ið kunnu standast av slíkum reglum.

Herðingin av 60%-regluni kann eisini hava óhepnar avleiðingar, tí at reiðarí kenna seg noydd at nýta 60% av sínum rættindum fyri at varðveita rættin til avhending, hóast fiskiskapurin møguliga ikki loysir seg. Hetta eggjar ikki til burðardygga veiðu heldur tvørturímóti. Hetta fer eisini merkja, at fiskiskip verða noydd at gagnnýta 60% av ávísum rættindum fyri at sleppa av við rættindi árið eftir. Á heysti 2022 varð uppskot lagt fyri tingið um, at 60%-reglan bert er galdandi fyri fyribils avhendingar fyri eitt ár. Hetta átti at verið tikið uppaftur, soleiðis at endaligar avhendingar ikki eru fevndar av 60%-regluni, eins og botnfiskakvoturnar undir Íslandi í gomlu lógini um vinnuligan fiskiskap.

Í galdandi lóg er ásett, at tá ið egin rættindi ikki eru brúkt við meira enn 30 prosentum í einum fiskiári, fellur munurin millum tað brúkta og 30% aftur til landið. Í lóg um fyrisiting av sjófeingi frá 2017 var hetta talið 60%. Henda áseting verður nú strikað í uppskotinum, og Reiðarafelagið tekur undir við hesi broyting. Hetta er ein bati fyri reiðaríini, og reglurnar gerast einfaldari at virka undir.

Tann yvirskipaða brúksskyldan uppá tvey ár verður framvegis galdandi, og hon verður galdandi frá 1. januar 2023. Henda brúksskylda er sum meginregla óbroytt í uppskotinum, men nú verður yvirskipaða brúksskyldan bert galdandi fyri veiðiloyvi og fevnir ikki um fiskiloyvi. Eisini eru undantaksreglurnar víðkaðar til at fevna um fleiri føri enn frammanundan.

Reiðarafelagið tekur undir við at víðka undantøkini, soleiðis at reiðarí ikki missa síni rættindi, tá ið fiskiskapurin er vánaligur ella at veiðibann er lýst fyri ávísan fiskiskap. Tó verður víst á munin millum undantøkini fyri 60%-regluna og ta yvirskipaðu 2 ára brúksskylduna, har viðmerkingarnar ikki fevna um tey somu førini. Fiskimálaráðið eigur at viðgera, um undantøkini fyri 60%-regluna skulu víðkast til at vera tey somu sum fyri yvirskipaðu brúksskylduna.

Ruddiligast hevði verið, um 2 ára brúksskyldan fylgdi gildiskomuni av 60%-regluni, soleiðis at hon eisini kom í gildi frá 1. januar 2024. Tí átti brúksskyldan komið í gildi samstundis sum 60%-reglan, tvs. frá 1. januar 2024, har fyrsta uppgerðartíðarskeiðið hevði verið 2024 og 2025.

Føroya Reiðarafelag

Stefan í Skorini, stjóri